# Fingu javnleik í 30 hitastigum

**Føroyar spældu týsdagin triðja og seinasta venjingardystin á ferðini í USA. Dysturin var ímóti Real Salt Lake City og endaði við javnleiki. Nú seta landsliðsspælararnir kósina heim ímóti Føroyum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroyska fótbóltslandsliðið fekk harða mótstøðu, tá ið liðið spældi triðja og seinasta venjingardystin á ferðini í USA.
Dysturin var týsdagin ímóti Real Salt Lake City, og úrslitið var javnleikur 1-1. Dysturin var spældur á heitasta degnum, meðan landsliðið hevur verið Florida, og umstøðurnar við brennandi sól og 30 hitastigum vóru ikki tær bestu hjá føroysku spælarunum.
Føroyar byrjaðu tó dystin væl, og longu í fyrsta minuttir hevði Fróði Benjaminssen eitt skot á tvørstongina. Aðrar naskar royndir vóru eisini fyrstu minuttirnar, men tá ið 11 minuttir vóru spældir, fekk føroyska liðið kalt vatn í høvdið.
Andrew Cunningham varð spældur leysur á føroysku hálvuni, og hann legði Real Salt Lake City fram um 1-0.

## Andrew javnaði

Føroyar høvdu aðrar royndir í fyrra hálvleiki, sum varð væl spældur við høgari leikferð og nógvum nærdystum.
Í seinna hálvleiki fekk Real Salt Lake City leikliga yvirvág, men føroyska liðið var vandamikið við mótálopum, har liðið fekk nógvar spælarar við fram á vøllin. Og tað endaði seint í dystinum við, at Føroyar javnaðu. Málið gjørdi Andrew av Fløtum.
Amerikanska liðið hevði nógv spæl í seinna hálvleiki, men teir skaptu teir ikki nógvar opnar kjansir, tí føroyska liðið stóð seg væl í verjupartinum, hóast liðformaðurin Óli Johannesen ikki spældi við í hesum dystinum. Miðverjan var mannað við Rasmus Nolsøe og Atla Danielsen, og teir høvdu ein tryggan aftasta skansa í Jákupi Mikkelsen.
Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, hevur roynt ymsar uppstillingar í venjingardystunum í USA, og hann heldur seg hava fingið fleiri møguleikar, tá ið landsliðið skal takast út aftur.



*Seinasti venjingardysturin í USA gjørdist tann strævnasti, men Føroyar fingu javnleik ímóti Real Salt Lake City*

## Á veg heim

Føroyska landsliðið er nú á veg heimaftur til Føroya. Fyrrapartin í dag var ein løtt venjing, áðrenn spælararnir pakkaðu og fóru av gistingarhúsinum.
Fyrst varð koyrt til Orlando, har flogið var til Chicago. Føroyska ferðalagið verður í Keypmannahavn á middegi í morgin, og síðani verður flogið heim til Føroya eftir eina drúgva ferð tvørtur um Atlantshavið.

**FAKTA**

Venjingardystur
Ft. Lauderdale, 28. februar 206
Real Salt Lake City-Føroyar
1-0: Andrew Cunningham, 11.
1-1: Andrew av Fløtum, 85.
Føroyar: Jákup Mikkelsen –Janus Joensen (Heðin á Lakjuni, 75.), Atli Danielsen, Rasmus Nolsøe, Christian Høgni Jacobsen – Hanus Thorleifsson (Mortan úr Hørg, 65.), Símun Samuelsen (Hjalgrím Elttør, 55.), Kári Nielsen, Fróði Benjaminsen, Jónhard Frederiksberg (Andrew av Fløtum, 55.) – Rógvi Jacobsen (Hans Pauli Samuelsen, 60.)

# Kyndil vil halda føðingardag í frið

**Kyndil minnir nú Hondbóltssambandið á, at felagið longu fyri einum ári síðani bað um, at eingir dystir í fremstu deildunum vóru spældir vikuskiftið 10. til 12. mars, tí tá skal Kyndil halda stórfignan føðingardag. HSF hevur lagt hálvfinalurnar í Sunset-kappingini júst hetta vikuskiftið**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Dagarnar frá 10. til 12. mars ætlar hondbóltsfelagið Kyndil at halda sín 50 ára føðingardag, og tað skal gerast við kappingum og veitslu.
Men hóast Kyndil hevur biðið Hondbóltssambandið (HSF) um at fáa frið til at halda føðingardagin tað vikuskiftið, hevur HSF ásett, at hálvfinalurnar í Sunset-kappingini skulu spælast sama vikuskiftið.
– Fyri heilum ári síðan boðaði eg vegna Kyndil frá, at vikuskiftið 10.-12. mars í ár høvdu vit bílagt allar hallirnar í býnum til kappingar hjá yngru deildunum í samband við, at felagið verður 50 ár 10. mars, skrivar Niels Nattestad vegna Kyndil í einum brævi til HSF.
– Somuleiðis bað eg um, at vaksnamannalið felagsins sluppu undan at spæla hetta vikuskiftið, bæði tí at vit skulu brúka ein hóp av fólki í samband við kappingarnar, og tí at vit leygarkvøldið 11. mars hava stovningarveitslu. Kortini síggi eg nú, at semifinalurnar í Sunset kappingini júst eru lagdar hetta vikuskiftið.
Eg haldi ikki, at tit kunnu loyva tykkum at halda hánt um eitt slíkt ynski frá einum felagi. Men tað er menniskjaligt at gloyma! Tí vóni eg, at talan er um eitt mistak, sum tit væntandi rætta, skrivar Niels Nattestad vegna Kyndil.
Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá kappingarleiðaranum hjá Hondbóltssambandinum áðrenn evstamark í dag.

# Brakið verður í dag

**Stóran part av kappingini hava teir verið á odda. Men í kvøld kann ætlaði finalusessurin hjá H71 av álvara koma í vanda**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hoyvíkingar hava stóran part av árinum - serstakliga í endaspælinum - verið mettir sum nærum tryggir finaluluttakarar. Tapið fyri Kyndli fyri 10 døgum síðani hevði tó við sær, at munurin til næstu liðini tódnaði, og tá teir ikki spældu sunnudagin, kundi Kyndil fara framvið.
Enn hava hoyvíkingar tó ein dyst til góðar, men hesin er alt annað enn lættur. Meistararnir úr VÍF koma nevnliga á vitjan hjá liðnum, sum mong rokna sum størsti avbjóðarin, og tað kann væl gerast ein heilt undirhaldandi dystur.
Tríggjar ferðir áður hava liðini hitst í ár. Teir báðar dystirnar í Vestmanna hevur VÍF vunnið tepurt, men H71 tók stigini, tá liðini dystaðust í Hoyvík í grundspælinum.
Megna hoyvíkingarnir at endurtaka tann sigurin, so fer at síggja heilt gott út hjá teimum. Tá verða tvey stig niður til triða plássið undan teimum trimum seinastu dystunum. Tríggir dystir, sum millum annað innihalda uppgerðir móti teimum báðum veikastu liðunum í bólkinum.
Hinvegin kann talan gerast um heilt trupla støðu, verður talan ikki um sigur. Ein støða, sum vestmenningar so sanniliga eisini kunnu skriva undir uppá. Meistararnir eru snøgt sagt tvingaðir at vinna. Ikki minst, tí eftirverandi skráin inniheldur útidyst móti Kyndli og heimadyst móti StÍF. Tveir dystir, har VÍF ikki pr. automatikk skal rokna við f‡ra stigum, og tí mugu hesi í stóran mun fáast aðra staðni frá, um vestmenningarnir ætla sær at vera partur av FM-finaluni.



*Bæði liðini skulu vinna. Men meðan eitt tap ger støðuna hjá H71 trupla, so vil eitt slíkt nærum gera støðuna hjá VÍF katastrofala undan seinastu umførunum*